# Altjóða fiskivinnu-framsýning í Brüsell

*Í næstu viku fer ein hópur av føroyingum til Brüsell at vera við á European Seafood Exposition, sum er ein av størstu fiskivinnuframsýningum í heiminum. Føroyski básurin hesaferð er sera forkunnugur. Hann er nevniliga bygdur upp rundan um »listabingjuna« hjá Tróndi Paturssyni*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í næstu viku fer ein av heimsins størstu fiskivinnuframsýningum av barkastokki í Brüssel. Tað er European Seafood Exposition, sum við tíðini hevur ment seg til at vera ein av teimum sera áhugaverdu framsýningunum. Ein av teimum, har allir, sum hava nakað við fisk at gera, hittast, og tí fara føroyingar mansterkir avstað.

Føroyska ferðalagið telur umleið 60 mans og hesaferð vera teir í tveimum básum. Menningarstovan stendur fyri tí størra føroyska básinum, meðan klaksvíkingar - Kósin undantikin - eru á einum dbási.

### Bjóða okkum fram

Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovunu, sigur, at eitt av endamálunum við føroysku luttøkuni er, at gera vart við Føroyar, sum ein seriøsan veitara av nógv góðskaðum fiskavørum. Hetta verður gjørt í einum bási, sum vísir føroyskan kreativitet, og hann leggur afturat, at básurin hesaferð er nakað heilt fyri seg.

– Vit hava boðið básgerðina út í lisitatión og vit mettu, at uppskotið hjá Petur & Petur var sera spennandi. Básurin verður bygdur upp um listabingjuna hjá Tróndi Pasturssyni og tað merkir, at útlendingarnir hesaferð ikki bara sleppa at síggja og hoyra um føroyskan fisk, men eisini um føroyska mentan og list, sigur Kjartan Kristiansen.

Hann vísir á, at tað hevur stóran týdning, at knýta hesi bæði saman, tí matgerð hevur so sanniliga nakað við kreativitet at gera.

– Tí kann tað sjálvandi enda við at útlendingar seta størri krøv til okkara, men tað er heldur ikki skaðiligt. At krøvini hækkað gangar føroysku vinnuni, sigur Kjartan Kristiansen.

### List heldur enn rúsdrekka

Annars sigur Kjartan, at Menningarstovan eisini hevur eitt annað endamál við hesi framsýningini og tað er at geva føroyskum fyritøkum góðar umstøður at hitta viðskiftafólkini.

– Í mognum førum brúka fyritøkurnar øl og rúsdrekka, sum magnet, fyri at fáa gestir inn á básarnar, men tað halda vit ikki vera so heppið. Tað dregur ofta fólk, men fleiri teirra koma uttan iva eftir ølinum, heldur enn fiskinum og tí er eftir okkara tykki frægari at brúka listina, sum magnet. Tað er eisini har, tað kreativa við matgerðini og listini kemur inn, sigur Kjartan Kristiansen.

Hann leggur afturat, at føroyingar hava sent innbjóðingar út til nógv fólk og tí væntar hann, at føroyski básurin í Brüssel, verður væl vitjaður.




Modellmynd petur&petur

### List og skeivir vinklar

Sum nevnt er tað fyritøkan »Petur & Petur«, sum hevur staðið fyri at gera básin. Petur Mohr Reinert greiðir frá, at teir hava valt at byggja básin upp um listabingjuna hjá Tróndi Paturssson og skapa ein heilt serligan bás burtur úr tí.

– Tað eru nógvir stuttligir vinklar í hesum bássinum, sum er uml. 140 fermetrar í tveimum hæddum. Átta fyritøkur skulu vera inni á básinum hjá Menningarstovuni, men tað fer at síggja út sum ein samanhangandi básur, hóast Faroe Seafood fer avstað við einum triðingi, meðan hinar sjey fyritøkurnar hava restina, sigur Petur Mohr.

Hann leggur afturat, at teir hava sett projektørljós á bingjuna, soleiðis at ljósávirkanin er á leið tann sama, sum tá hann stendur í túninum hjá Listaskálanum. Hetta skuldi so gjørt, at tann veruliga effektin fæst burturúr bingjuni.

Spurdur um tað hesur so stóran týdning at gera soi nógv burturúr básgerðini sigur Petur Mohr Reinert, at tað hevur tað í hesum førinum.

–· Hetta er ein av heimsins størstu framsýningum og øll tey, sum hava nakað við fisk at gera eru her. Tí eru nógvir keypmenn, sum t. d. ístaðin fyri ein rundtúr í Evropa, leggja leiðina til hesa framsýningina. Tey, sum tey skulu hitta, tey eru her hesar dagarnar.

So er bert eftir at vóna, at føroysku luttakararnir fáa nakað burturúr framsýningini í Brüssel.

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

Vit verða við á Bilstevnuni í Vágunum leygar- og sunnudagin

KIA

CARNIVAL

2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"



Fæst eisini sum vøruvognur



EINANS 187.800,-

Multibilurin
til einhvørja loysn

Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

3 ára garanti/100.000 km. garanti



EINANS 225.800,-

Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 310600



# Hjørtuni millum bestu boðini

*Lena, Leif og Niclas fingu fyrstu virðisløn í sangkappingini Vælskapt brek. Tríggir teir bestu sangirnir vórðu kunngjørdir og heiðraðir í Norðurlandahúsinum hóskvøldið og millum tey 80 innkomnu uppskotini var trupult hjá dómsnevndini at taka støðu. Bestu løgini vóru kosin og hjørtuni komu millum bestu boðini*

DAGFINN OLSEN
MYNDIR: JENS K. VANG

Spenningurin var stórur í Norðurlandahúsinum hóskvøldið. Sangkappingin Vælskapt Brek var á skránni. Kappingin var útskrivað fyri nøkrum fáum mánaðum síðani av einum áhugabólki, fyri at gera vart við umstøðurnar hjá brekaðum.

Men undan avdúkingini hóskvøldið var als einki at frætta og eingin segði seg hava nakra ábending um, hvør fór avstað við fyrstu virðisløn.

### Hjørtuni vunnu

Eftir at Sámal Petersen og Jóannes Andreasen høvdu leikt yndisliga, beyð Jákup Magnussen stóru mannfjøldini vælkomnari. Síðani fekk Hilmar Jan Hansen orðið vegna áhugabólkin, ið tók stig til tiltakið. Hann hevur verið eitt slag av skrivara og millumlið til fjølmiðlar. Hann greiddi stutt frá kappingini og fegnaðist um stóru luttøkuna, og takkaði LÍV, ið eina hevur stuðlað tiltakinum.

Síðani sang Tórshavnar Manskór og so kom stóra løtan.

Katrin Johansen hevur sitið í dómsnevndini, saman við Elini Heinesen, Hans Trúgva Teirin, Gunnari Hoydal og Sunleifi Rasmussen. Nevndin fekk eina stóra uppgávu , tá hon skuldi taka støðu millum tey 80 innkomnu løgini, yrkingarnar og sangirnar. Hetta er av størstu luttøkum nakrantíð í slíkari kapping og dómsnevndin varð ikki liðug við arbeiðið, fyrr enn kvøldið fyri avdúkingina..

Katrin Johansen byrjaði við 3. virðisløn. Lagið nevnist Hjarta mítt dansar og tað eru Uni Arge og Eyðun Nolsøe, ið hava skrivað. Dómsnevndin metir, at lagið festir seg beinanveg og orðini eru einføld og við greiðum boðskapi. Vegna Una og Eyðun tók Johanna Arge ímóti virðislønini uppá 3000 krónur.

Síðani kom 2. virðisløn. Hon fall til sangin Hjarta, ið Pætur við Keldu hevur skrivað. Ein lítillátaður sangur, ið letur seg upp við vøkrum lag og skaldsligum og djúpum teksti, sigur dómsnevndin. Vegna sonin tók Jógvan við Keldu ímóti virðislønini uppá 5000 krónur.

Spenningurin var stórur, tí so var bert 1. virðisløn eftir. Hon fall til sangin Annað boð, ið Leif og Lena Andersen og Niclas Johannesen hava skrivað. Nevndin metir hetta vera í orðum og lag frískligt og eitt lag, fult av gleði, ið verður framborið á tónlistarliga høgum støði. Leif Andersen tók ímóti virðislønini uppá 10.000 krónur.

Nummar eitt gjørdist sostatt Annað Boð, Nummar tvey Hjarta og 3. pláss fekk lagið Hjatra Mítt Dansar. Bestu løgini vóru kosin, og talan var um ein dag, har hjørtuni komu millum bestu boðini.

### Fløga kemur seinni

Jóhannus á Rógvu Joensen er tónlistarligi leigarin í ætlanini Vælskapt Brek. Ætlanin hevur alla tíðina verið at geva út fløgu við nøkrum av bestu innkomnu sangunum.

Johannus allar sær í gongd sum skjótast og talan verður um eini 15 - 20 løg. Hvørt talan verður um dupultfløgu, nú so nógv løg eru innkomin, torir hann ikki at meta um, tí ein slík er nærum dupult so kostnaðarmikil at framleiða.

Tórshavnar Manskór sang at enda og sum Jákup Magnussen tók til, so kunnu tey, ið hava sent inn, men ikki komu upp í part nú, bert vóna, at tey eru við, tá tað seinni verður kunngjørt, hvør sleppur við á fløguna við løgum frá sangkappingini Vælskapt Brek.




*Á 1. pláss í sangkappingini Vælskapt Brek komu Leif og Lena Andersen og Niclas Jonannesen. Leif tók ímóti virðislønini. Pætur við keldu kom á 2. pláss og Jógvan við Keldu tók ímóti vegna sonin. Á 3. Pláss komu Uni Arge og Eyðun Nolsøe og teirra vegna tók Johanna Arge ímóti virðislønini. Myndina aftanfyri teknaði Eli Smith*



*Veðrið var av tí fagrasta hósdagin og nógv fólk leitaði sær í Norðurlandahúsið, tí spenningurin var stórur, tá vinnarar í sangkappingini skuldu avdúkast*

NOKIA
GSM • NMT 450

PROFESSIONAL MTU 4YOU EXPERIENCE



NOKIA 6150 Kr. 3.195.-
NOKIA 3210 Kr. 2.095.-
NOKIA 650 Kr. 4.295.-
NOKIA 7110 Kr. 3.645.-
NOKIA 8210 Kr. 4.495.-
NOKIA 640 Kr. 3.195.-
NOKIA 8850 Kr. 6.645.-

Sosialurin - 311820

Øll eykaútgerð
til tína NOKIA fartelefon

Δ DELTA
ELEKTRONIKTÆNASTAN
J. PATURSSONARGØTA 18
100 TÓRSHAVN
TEL. 318050 FAX. 320350